**VIÐMERKINGAR**

# Skarv gav skarvin yvir



*Tilboðið frá Náttklubbanum »Jackways« hevur havt ávirkan á 30 ára gamla samkomustað føroyingar í Keypmannahavn, Skarv*

**Johild Ziskason**

1. februar 2003 endaði ein epoka. Ein samkomustaður fyri føroyingar ígjøgnum nærum 30 ár mátti lúta fyri gongdini. Hvat er hent síðani tað skuldi enda so?

Skarv hevur virkað sum ein mentunarligur miðdepil fyri føroyingar í Keypmannahavn. Her komu føroyingar úr øllum samfelagsklassum - ferðandi, lesandi, fastbúgvandi føroyingar í Danmark, handilsfólk og danir við tøttum bondum til Føroyar. Her varð dansað til føroyskan tónleik, borðreitt varð við føroyskum viðskera og serliga kjak um politik, mentan, religión, ítrótt v.m. Altíð endaði tað við felagssangi, onkur dugdi altíð at spæla á guittara ella á harmoniku. Stutt sagt, her livdi og andaði hin føroyska fólkasálin í einum fríum skifti av sjónarmiðum. Við tíðini komu grønlendingar til. Teir funnu her ein felagsskap, orsakað av tí felagstilknýti teir hava saman við føroyingum til Danmark, og tað var í nógv ár, lutvíst saman við íslendingum, ein serligur norrønur dámur, ið var heilt einastandani fyri Skarv.

Hetta gekk væl í nógv ár. Skarv megnaði at endurnýggja seg við umbygging og stílaskifti, ið nú var til hvørja tíð. Innanhýsismyndin hevur skift millum eitt slag av western-bodega stíli yvir í eina spegilskafé, og tey seinastu árini sum ein meira fín barr og dansistova. Hóast skiftini hevur fólkaligheitin og hin breiði tokkurin til øll samfelagsløg verið sermerkið hjá Skarv. Her kundi stórreiðarin møta tí unga studentinum í Keypmannahavn, og her kundu politikarar veruliga fáa fólk í talu, tí tað fyrst og fremst var tað tjóðskaparliga tilknýtið, ið hevði týdning. Tey flestu kenna týdningin av, at møta landsmonnum í øðrum londum.

Við tíðini kykna ósemjur seg upp bæði millum føroyingar innanhýsis og millum føroyingar og grønlendingar. Rúm og tollyndi verður minni. Sambandið og góðsemi millum føroyingar og grønlendingar verður avloyst av atfinningarsomum røddum, serliga frá tí nýggju aðalkjarnuni úr Føroyum, ið ikki heldur at Skarv er gott nokk. Viðmerkingar sum at "ein helst ikki vil møta fullum grønlendingum á Skarv" og at "føroyskur tónleikur er ov pínligur at spæla á einum diskuteki" er alt meira alminduligur at hoyra.

Tað er í hesi støðu, at Todi Jónsson og aðrir lata upp dýra náttklubban "Jackways" á Hauser Plads, sum eitt beinleiðis tilboð til tey "ungu, ríku og vøkru", og tey, ið fegin vilja verða tað. Her verður brúkt dresscode og her verður kraftigur skilnaður gjørdur millum almenningin. (Eitt fyribrigdi ein kennur aftur frá áttatiárunum). Her er ikki rúm fyri "de skæve eksistenser" millum føroyingar, og so serliga ikki grønlendingum. Her verður klárt sagt nei til ein føroyskan/grønlendskan felagsskap í ein so stóran mun, at tað ber brá av mannamuni. Tað eru nógv dømi uppá, hvussu grønlendingar eru avvístir við eini heldur ivasamari grundgeving.

Daniel P. Thorsteinsson úr Vági metir í hesi støðu, at tíðin er komin til eitt ættarskifti. Hann letur Skarv yvir til dóttrina Siri, ið væl skilir, at okkurt nýtt skal til. Hon hevur broytt navnið á Skarv til tað núverandi "Lemon", byggir um og broytir stíl í ein slíkan mun, at staðið meira vendir sær til tann almindiliga danska almenningin. Hennara føroyska bakgrund avnoktar seg ikki, so sjálvandi eru føroyingar framhaldandi vælkomnir, men tað verður uttan veðra høvd, Skarv og føroyskar myndir frá 1900 talinum á veggunum.






# Bilar

Nr. 30 • hósdagur • 13. februar 2003 • 77. árg.



*Eftir at John Christiansen hevði arbeitt á Dimmalætting í 28 ár, fekk hann sær útbúgving sum koyrilærari til persónbil, lastbil, buss, trailara og motorsúkklu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

John Christiansen koyrilærari:

# Nú vilja kvinnurnar koyra motorsúkklu



*Nú vilju kvinnurnar sjálvar koyra motorsúkklu. Tær eru troyttar av at sita aftan fyri hjá monnunum. Her tað Fríða Berg, sum roynir Yamaha motorsúkkluna hjá John Christiansen*

**Fimtan kvinnur eru í løtuni í holt við at taka koyrikort til motorsúkklu. "Tað er sjáldsamt at hava ein flokk, har meirilutin av luttakarunum eru kvinnur" sigur John Christiansen koyrilærari í Havn**

KOYRIFRÁLÆRA
*Magnus Gunnarsson*

Her hjá okkum hava tað mest verið mannfólkini, ið koyra á motorsúkklu, men nú sær tað út til, at vend kemur í. John Christiansen koyrilærari í Havn hevur ein flokk við 15 kvinnum, ið ætla sær at koyra motorsúkklu. Tað eru ikki bert tær ungu kvinnurnar, sum ætla sær motorsúkklu koyrikort, tann yngsta er fyrst í 20-unum, meðan tann elsta er yvir 50. Tað er ikki bara her hjá okkum, at kvinnurnar hava fingið áhuga fyri at koyra motorsúkklu, men hetta er eitt rák í fleiri londum. Ein orsøk kann verða, at kvinnurnar eru troyttar av at sita aftan fyri hjá monnunum, nú vilja tær koyra sjálvar sleppa at koyra. John hevur fingið sær eina Yamaha Virago 535 motorsúkklu, sum er væl egnað til konufólk at koyra á.

## Útbúgving sum koyrilærari

John Christiansen er útbúgvin skrivstovumaður. Hann lærdi á Dimmalætting og arbeiddi har í 28 ár. Tey seinnu árini í leiðandi starvi í fyritøkuni. Í apríl 2000 fór hann at læra til koyrilærara. Familjan fluttu til Danmarkar, har John fekk sær útbúgving sum koyrilærari til persónbil, lastbil, buss, trailara og motorsúkklu. Útbúgvingin tók næstan tvey ár. Hann arbeiddi eisini sum koyrilærari í Danmark, áðrenn tey fluttu heimaftur. Hetta gav honum góðar royndir sum koyrilærari. "Tað er annarleiðis at koyra í Danmark, hóast ferðslan er nógv, er hon í flestu førum meira skipað enn her hjá okkum. Har eru eisini súkklubreytirnar at ansa eftir. Ferðslan í Føroyum er tøtt, og trongligt er í gøtunum. Í Danmark kemur tað ofta fyri, at fólk vilja gjalda eyka fyri at fáa serundirvísing. Hetta gera tey fyri at sleppa undan at vera saman við øðrum til teoritímarnar", sigur John, sum arbeiðir sum sjálvstøðugur koyrilærari. Í løtuni er hann knýttur at koyriskúlanum, Sp/f Koyrikortið í Havn.